VIÐMERKINGAR

# Á fólkatingi nýtist tær als einki at gera!

## Viðmerking til Jóannes Eidesgaard

**Sjúrður Skaale**



VAL05

Í andglettinum týskvøldið segði Jóannes Eidesgaard, at hann ikki hevði verið so nógv á fólkatingi sum Sjúrður Skaale, men at Sjúrður jú var skrivari, og hevði fingið løn fyri tað.

Sjálvur segði Jóannes seg hava røkt sínar skyldur sum fólkatingsmaður, hóast hann hevði tvey størv samstundis. Tað bar væl til, tí tað var ikki altíð so nógv at gera á fólkatingi, segði hann.

Sannleikin er, at ein føroyskur fólkatingsmaður ongar sum helst fastar skyldur ella uppgávur hevur. Og tað hevur skrivari hansara heldur ikki. Føroysku umboðini arbeiða júst so nógv, sum tey vilja sjálv. Tey kunnu gera nógv; tey kunnu gera lítið — og tey kunnu einki gera.

Ein fólkatingsmaður má átaka sær uppgávur — eingin annar gevur honum tær. ABC-flokkarnir hava næstan ongar uppgávur átikið sær á fólkatingi. Tjóðveldisflokkurin hevur átikið sær nógvar uppgávur.

Tað er munurin. Nøkur arbeiða, onnur arbeiða ikki.

Men veljarin fær mest fyri atkvøðuna, um hann velur ein, sum arbeiðir.

# Ríkisfelagsskapurin og fyrimunir

**Birgir Mohr**
*Sandi*



VAL05

Javnaðarflokkurin var ein av flokkunum aftan fyri heimastýrislógina, sum tá var skírd vina- og frælsisbræv. Tey av okkum, sum minnast aftur til tíðina eftir 1948 og fram til í dag ásanna, at veldugur framburður hevur verið her í Føroyum.

Eisini tí er Javnaðarflokkurin framvegis fyri ríkisfelagsskapinum við Danmark, og hevur ongantíð verið fyri loysing ella kvetting sum politiskt mál, men vil vinna meira fram á sjálvstýrisleið við hóvligum samráðingum og praktiskum politiskum loysnum.

Og væl hevur borið til. Vit føroyingar hava í dag lívsfrælsi, um nakað fólkaslag hevur tað.

Í 6 ár livdu vit við tí sokallaða fullveldislandsstýrinum – ein sera ótrygg politisk tíð við ótta fyri, hvat teir nú funnu uppá. Núverandi landsstýri ber seg bæði skilabetur og virðiligari at, enn tað fyrra, sum bert náddi at skerja blokkin við einum triðingi – av berari dummstoltheit, tí í dag restar okkum hendan pening á landsfíggjarlógini – tað var úrslitið av fullveldisflokkunum.

So langt vit í dag evna at síggja fram, er neyvan skilagott at loysa okkum úr aldargamla ríkisfelagsskapinum, men fyritreytir og umstøður broytast, og tá er tað neyðugt at finna nýggjar loysnir við hóvligum samráðingum og breiðum semjum. Og tað kann blíva neyðugt hjá okkum at yvirtaka stór málsøkir, sum í dag eru felagsmál, og hesum er Javnaðarflokkurin vakin fyri, men vit vilja varðveita ríkisfelagsskapin.

Tí tað eru stórir fyriunir fyri Føroyar og okkum føroyingar at vera saman við einum størri landi sum Danmark. Tað sparir okkum fyri hóp av peningi til útlendska umboðan, ambassadur og konsulat, internationalar felagsskapir og hjálparorganisatiónir, samstundis sum danski tjóðbanin og búskapurin tryggja virði á krónuni. Vit hava ikki hernaðarligar útreiðslur, og donsku borgararættindi føroyinga geva okkum sama rætt sum danir til alt undirvísingarverkið, alt heilsuverkið og mangt annað í Danmark. Og har búgva nú heilt nógvir føroyingar.

Tað er órealistiskt at siga Føroya fólki, at vit sum suverenur statur fara at spæla nakra avgerandi rollu í internationalum høpi. Vit føroyingar kunnu best verða við í samstarvi og spæla okkara rollu gjøgnum ríkisfelagsskapin, norðurlendska og europeiska samstarvið.

Flestu føroyingar skilja í dag, at ein loysing framd við 1998-landsstýrinum, hevði verið ein sosial og búskaparlig katastrofa fyri okkum føroyingar við 4 ára skiftistíð, sum nú hevði verið liðug.

Búskapur okkara sveiggjar við nøkrum góðum árum og nøkrum ringum árum. Beint nú hava vit vánalig tøl fyri flestu vinnur bæði á landi og sjógvi. Hvussu skuldu vit heilt kunnað verið blokkstuðulin fyri uttan, umframt ta kvartu milliardina, sum Danmark gjaldar okkum uttan um blokkin árliga???

Og hvussu skuldu vit verið ríkisfelagsskapin fyri uttan? Hvør skuldi goldið og tikið um endan? Tí tað hevði verið ikki bara truppult, men sera truppult at fingið fíggjarlógina at hanga saman og búskapurin, vælferðin og livistøðið hevði verið farið í botn – tað hevði verið úrslitið av loysingini.

Er tað tað vit ynskja – nei. Tí sigur Javnaðarflokkurin nei til loysing, men ja til størri frælsi, meiri samstarv og ríkisfelagsskap.

Veljið Javnaðarflokkin!

# Er útlendskur peningur í føroyska valstríðnum ?

**Er faldarin frá Norðuratlansbólkinum goldin við donskum peningi – og nýtir Tjóðveldisflokkurin danskan pening í valstríðnum í Føroyum?**

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins*



VAL05

Tann spurning seta mong, eftir at Norðuratlantsbólkurin hevur sent ein faldara í hvørt hús í Føroyum.

Aðrir flokkar og persónar gjalda sjálvi fyri valstríðið í Føroyum.

Er ikki nóg mikið hjá Tjóðveldisflokkinum at hava valstríð í Føroyum fyri føroyskan pening – sum aðrir føroyingar?

Milliónir av donskum peningi eru goldnar til Tjóðveldisflokkin ígjøgnum Norðuratlantsbólkin

Tað kann staðfestast at "danskar kassadamur hjá Netto og Føtex " skulu til arbeiðis hvønn dag, fyri at gjalda milliónir av krónum til Norðuratlansbólkin hjá Tjóðveldisflokkinum.

Skulu danskar kassadamur nú til arbeiðis fyri at at fíggja eitt valstríð hjá Tjóðveldisflokkinum í Føroyum?

Tjóðveldisflokkurin tykist ikki kenna sær hógv, eins og uppfinnsemi er stórt, tá talan er um at fáa fatur á donskum peningi til Tjóðveldisflokkin.

Men at loysingarflokkurin nú tykist hava valstríð í Føroyum fyri danskan pening - tað man vera ovboðið hjá flestum føroyingum.

Áhugavert hevði verið at vita, hvat Ríkisrevisiónir segði um hesi viðurskiftir.

# ES-grundlógin

**Ragnar S. Olsen**



VAL05

Avgerðirnar skulu takast í Føroyum og ikki á Christiansborg, og fyri alt í verðini ikki í Brússel.

XA Valevni Fólkafloksins

# Sum mest burturúr

**Poul D. Clementsen**
*Fólkaflokkurin*



VAL05

Á fólkatingi skulu vit hava upplýsing, ávirkan og úrslit. Tað megnar bara Fólkaflokkurin.

# Nýggir limir í Búskaparráðið

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum hevur valt tríggjar nýggjar limir í Búskaparráðið**

BÚSKAPARRÁÐIÐ
*tíðindaskriv frá Fíggjarmálaráðnum*

Í samband við at Hermann Oskarsson, Marner Jacobsen og Mirjam Haraldsen hava sagt seg úr Búskaparráðnum, hevur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, valt tríggjar nýggjar limir í ráðið. Limirnir eru valdir sambært Løgtingslóg um Búskaparráð.

Valdur samb. § 2a:
Johnny í Grótinum, cand. polit, Tórshavn

Valdir samb. § 2b:
Poul Geert Hansen, cand. polit, MPA, Tórshavn
Magni Laksafoss, cand. polit, Streymnes

**Búskaparráðið er nú mannað soleiðis:**

Vald samb. § 2a:
Una Joensen, cand. oecon, Hoyvík
Óli Samró, cand. oecon, Hoyvík
Johnny í Grótinum, cand. polit, Tórshavn

Vald samb. § 2b:
Anna Kass, M.Sc. Econ., Hoyvík
Gunvør Balle, cand. merc Argir
Poul Geert Hansen, cand. polit, MPA, Tórshavn
Magni Laksafoss, cand. polit, 435 Streymnes

Ráðið skipar seg við formanni, sum skal vera ein av teimum trimum, ið eru vald eftir § 2a.

Valskeiðið gongur út tann 31. desember 2005, tá allir limirnir í Búskaparráðnum standa fyri vali.